# FERÐAVINNAN Í NORÐOYGGJUM

Útsetti eyka aðalfundurin verður hildin týsdagin, 5. februar 2008 kl. 19 í hølum Norðoya Kunningarstovu (Varpabrúgvin 1)

**Á skránni:**
Viðtøkubroyting

**Allir limir felagsins eru vælkomnir**

---

MASKINMEISTARAFELAGIÐ

# Limafundur

**Maskinmeistarar við handilsskipum**

Fundur verður fyri limir, ið eru umfataðir av sáttmálanum við Reiðarafelagið fyri Farmaskip

**fríggjadagin 25. januar kl. 14.00**

í fundarhøli felagsins á Grønlandsvegi 58.

Til viðgerðar verða sáttmálaviðurskiftir.

---

# Hús til sølu
## ella umbýting við íbúð

Stór 1. planshús, ný renoveraði við íbúð, í friðarligum umhvørvi.

**Bill. mrk. 230108-001**

---

# Telefonfólk søkist

Søkt verður eftir einum fyrikomandi fólki at arbeiða sum telefonumstillari og annað fyrifallandi arbeiði, at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiði er í skiftandi vaktum.

**Bill. mrk. 230108-002**

---

Rokniskapartænastur kring Føroyar

- Bókhald
- MVG-uppgerð
- Grannskoðan
- Rokniskapur

...altíð dagførdir!

Rokniskaparstovan, bkv.fo
Telefon 310090
Email: bkv@bkv.fo
J. Dahlsgøta 2 · FO-100 Tórshavn

---

Lesið Sosialin -tað loysir seg

---

TVØROYRAR KOMMUNA

# Størv til Dagstovnin Mýrifípuna í Trongisvági

**Endurlýsing: Pedagogur og Fysio- ella Ergoterapeutur søkist til Stuðulstoymið**

Vit kunna bjóða tær eitt spennandi og mennandi starv við nógvum avbjóðingum, har tú kanst arbeiða sjálvstøðug/ur og í samstarvi við foreldur,starvsfólk og aðrar fakbólkar.

**Stovnslýsing:**
Mýrifípan er ein dagstovnur í Tvøroyrar Kommunu. Á stovninum eru 73 sera fitt børn í aldrinum 0 til 7 ár og 20 dugnalig starvsfólk. Stovnurin er skipaður í 5 eindir, vøggustovu, 2 barnagarðsstovur, útibarnagarður og stuðulstoymið.

**Arbeiðssetningurin** hjá Stuðulstoyminum er fyrst og fremst at stuðla og stimbra børnum við serligum tørvi í Mýrifípuni, harnæst at ráðgeva og vegleiða foreldur og starvsfólk. Stuðulstoymið eygleiðir og vegleiðir eisini í Frítíðarskúlanum og Dagrøktunum í Tvøroyrar Kommunu og í samstarvskommunum, Hvalba, Famjin og Sumba. Gott samstarv er við aðrar fakbólkar, so sum serráðgeva, heilsufrøðing og talulærara. NSR tænastan byrjar í Suðuroy í næstum eisini.

**Vit vænta av tær, at tú:**
- Kanst arbeiða sjálsstøðugt
- Hevur góð samstarvsevnir
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- Ert lagalig/ur, vísir gleði og áhuga í arbeiðnum
- Dugir at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum
- Hevur vilja og áhuga í at dagføra tína fakligu vitan

**Arbeiðstíðin:**
Stovnurin hevur opið millum 7.30 til 18.00, tínar arbeiðstíðir skipar tú sjáv/ur saman við hinum í toyminum. Vikutímatalið kann verða frá 20 til 40 tímar, alt eftir tínum ynski.

**Lønarviðurskifti:**
Løn sambart sáttmála millum Kommunusamskipan Føroya og Føroya Pedagogfelag ella avvarðandi fakfelag.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Meir fæst at vita um størvini við at venda sær til Guðrun Petersen, leiðara á tlf: 37 27 00

**Umsókn:**
Umsókn, saman við prógvið og viðmælum, skal sendast til Dagstovnin Mýrifípan, Smærugøta 8, FO 826 Trongisvágur, innan 1. mars 2008.

---

# Bilførari søkist

Søkt verður eftir bilførara.
Skal hava stóra koyrikortið.

**H.H. Trans Sp/f · 212708**

---




---

Bilur tín verður sum nýggjur

Vit gera smáskaðar, polera, bona og lakkforsegla bil tín við Nano Cover

Quick Repair
Á Hjalla · tlf. 21 33 23